## Undirvísingar- og Mentamálstýrið
### Mentamáladeildin

# ENDURLÝSING

# Deildarleiðari

## til deildina fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar á Tvøroyri

Sjúkrasystraskúli Føroya fer, umframt at fevna um sjúkrasystraútbúgvingina, eisini at fevna um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Skúlin fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir, og fer hvør rásin sær at hava ein deildarleiðara við fakligari og námsfrøðiligari ábyrgd, ið vísir til rektaran á skúlanum.

Avgjørt er, at deildin fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar skal liggja á Tvøroyri. Vegna broyttar umstøður í arbeiðsumhvørvinum verður lýst av nýggjum eftir deildarleiðara til almanna- og heilsuútbúgvingarnar.

**Vit sóknast eftir einum persóni, ið**

- hevur framhaldsútbúgving, ið kann metast at vera viðkomandi fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar.
- hevur vitan um og royndir innan útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið og gjarna innan miðnámsútbúgvingar.
- hevur royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av almanna- og heilsuútbúgvingunum.
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri næmingar, lærarar og starvsfólk.

**Høvuðsuppgávur**

- Hava dagligu leiðsluna av deildini um hendi
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingunum
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi næmingum
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um Undirvísingar- og Mentamálastýrið og stovnar tess. Setanarstaðið verður fyrst og fremst á Tvøroyri, men arbeiðið verður eisini í øðrum parti av landinum.

**Vit bjóða**
Eitt starv við avbjóðing, har tú verður við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina í skúlanum.

**Umsókn**
við prógvum o.ø verður at senda til:
Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 25.09.2000**, kl. 16.00.
Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tygum ynskja fleiri upplýsingar, herundir eina starvslýsing, kunna tygum ringja til Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa, á tlf. 355050.

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Sjúkrasystraskúli Føroya*** *hevur tvær útbúgvingarrásir, har onnur rásin er sjúkrasystraútbúgvingin, ið liggur í Tórshavn, og hin tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar, ið skulu liggja á Tvøroyri. Sjúkrasystraútbúgvingin er ein miðallong framhaldsútbúgving á 45 mðr.. Almanna- og heilsuútbúgvingarnar umfata almanna- og heilsuhjálparaútbúgvingina, 1 ár, og almanna- og heilsurøktarútbúgvingina, 1½ ár. Í løtuni eru um 9 størv á Sjúkrasystraskúla Føroya, og økist hetta nakað, tá tann nýggja skipanin er farin at virka.*



*NÝTT í 3-aranum*

# FÁ SKIL Á TÍÐINI

## STEMPUL SKIPANIR

**Stempul-inn og stempul-út skipanir**
Til fyritøkur og virkir, ið hava brúk fyri meira enn einum vanligum stempul uri. Serliga vælegnað til flakavirkir o.t.

Skipanin kann setast til PC-ara og gevur eitt lætt og gott yvirlit. Skiftir sjálvt millum summar- og vetrartíð og hevur eisini hópin av øðrum skipanum, so sum flextíðarroknskap, yvirtíðarroknskap, feriuroknskap o.a.

***3-arin umboðar ur- og lása-skipanir hjá Dansk Tidskontrol. Vit hava nógvar loysnir uppá ymsar ur- og tíðarskipanir, sum hóska til fyritøkur, skúlar, ítróttarhallir og virkir í ymsum støddum. Kom inn til okkara og fá eitt prát við okkum um tín tørv.***

3arin

*SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36*
*E-mail: tryarin@post.olivant.fo*

SANSIR · TEL 355 355

# Til sølu
# Mercedes E190 2.6



6 cyl. bensin, elektroniska innspræning, automatgear, ABS, klimaútbúna, fartpilot, powerstýring, sóltak, sentrallás, el-rútavindarar og taxaleður innan. árg. 89.

Bilurin hevur koyrt 57000 km, ein eigari og er sera vælhildin.

Áhugað ring

**tlf. 31 67 95 eftir kl. 17**

# Til sølu

Sethús í Funningi:

Grundøki: 244 m², við ástandandi úthúsið
Kjallarahædd: óinnrættað
Stovuhædd: 42 m². Stova/køkur, durur og wc. Altan
Loftshædd: 40 m². 3 kømur, baðirúm og gongd.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu venda sær til

**Húsalánsgrunnin, tlf. 314583**

# Sethús
## sum standa við høvuðsvegin í Saltangará
# til sølu

Um hóskandi boð fæst verða húsini seld. Húsini eru innrættað í báðum hæddum. Hvør hæddin er 120 m². Kjallarin er vælegnaður til skrivstovuhølir, handil, frisørsalong o.a. Grundstykki er 1200 m². Boð undir 1 mió. hava ongan áhuga.

Áhugað verða biðin at ringja á

**Tlf. 0045 74430604**
**mob. 0045 21624195**

# Fa. WATERSPORTS



# Vatnskutari til sølu
Yamaha XL 700 frá 05.05.2000. Ring og hoyr nærri

**Watersport • Tvøroyri**
**Tel. 37 21 10 • Mobil 21 52 10**



# FÝRVERK TIL ÁR 2001

**Til bý- og bygdarráð, ítróttarfeløg, býlingar og aðrar felagsskapir**

Hava tit ætlanir um at gera eitt sindur meira burtur úr nýggjárinum hesaferð? Setið tykkum so í samband við okkum!!! Vit hava drúgvar royndir at selja fýrverk til nýggjár, stevnur, brúðleyp o.o. tiltøk.

Í ár kunnu vit bjóða øllum felagskapum tað vælumtókta **ROYAL-FÝRVERKI** fyri serprís.

**Verð ikki ov seinur, tíðin er knøpp og mongdin er avmarkað.**

**P/F J. F. Kjølbro Heilsøla**
Stangavegur 3 - Box 50
FO-700 Klaksvík - **Tel. 455340**

# KOYRIKORT

Nýtt skeið byrjar 2/10

**Lágar prísir!**

**Eisini fæst koyrikort uppá stutta tíð.**

**Koyriskúlin**
**v/ Edvin Bernhardson**
Sigmundargøta 8 • 100 Tórshavn
Tel. 312271, 283380 og 286271

**Trygdarútgerð til øll endamál!**

- **Verndarhjálmar og húgvur**
- **Hoyrivernd v/FM radio**
- **Brillur**
- **Maskur**
- **Trygdarskógvar**
- **Fallsikringar**
- **Handskar**
- **Hondreins**
- **Vit útvega skiltir til øll endamál!**

**Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd**

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

# Føroya Tele Miðvágur

**Montørur/Kaðalmaður**

Søkt verður eftir einum montøri/kaðalmanni til Føroya Tele í Miðvági. Arbeiðið er í stóran mun nýgerð og viðlíkahald av telefoninstallatiónum og kaðalnetinum.

Vít kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við atliti til:
- Nýgerð og viðlíkahald av telefoninstallatiónum og kaðalnetinum
- Vanliga telefonútgerð
- Vekslarar
- Innanhýsis kaðalskipanir
- Uttanhýsis kaðalskipanir
- Teleterminalar av ymiskum slag
- Internet og ISDN
- At ráðgeva viðskiftafólk um felagaútgerð og tænastur.

Útbúgving:
Elektronikkmekanikari, elektrikari, líknandi útbúgving og/ella hollar royndir sum montør/kaðalmaður.

Tað er ein fyrimunur, at tú í stóran mun kanst arbeiða sjálvstøðugt, er opin og dugir væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hevur royndir innan EDV á brúkarastøði.

Starvsstaður:
Øki 3, Vágar/Mykines

Uppmøtingarstað:
Føroya Tele í Miðvági

Byrjanardato:
Skjótast tilber

Starvið er lønt sambært sattmála millum Føroya Tele og Starvsmanna-felagið.

Áhugað kunnu venda sær til Terja Johannesen, økisleiðara fyri øki 3, tlf. 33 30 00.

Umsóknir skulu verða starvsfólkadeildini í hendi, seinast tann 28. septembur og skulu sendast til.

Føroya Tele
Att:Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR · TEL 355 355

# DAN-JOB

Søger unge piger til vintersæson 15.12.2000 til skirestauranter i Schweiz.

Flere af vore kunder søger personale (30-40) til køkken, værelse, service og afrydderjob i Schweiz vintersæson 2000/1. www.danjob.dk

**Tlf. 0045 75711000**

Ansøgningsfristen: 30.9.2000.

**JUNIOR**
**BUSS TAXA KOYRING**

pláss til 10 ferðandi

**Tlf. 22 33 11**
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

# Timburmenn søkjast

Søkt verður eftir 3 timburmonnum, til arbeiði á Sælandi (mugu hava sveinabræv), at byrja sum skjótast, góð setanarviðurskiftir.

Áhugaðir ringið á

**Mob. 0045 24871586**
**ella 0045 38162586**

# Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 24. september kl. 16.00 heldur Niels J. Arge, klokkari í Klaksvík fyrilestur í konfirmantstovuni í Fuglafjarðar kirkju um evnið: Klokkaratænastan.

**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**
Postboks 1121 · tlf. +298 321132 · fax +298 321761 · FO-110 Tórshavn

1000



# Gravsteinar og kantsteinar. Nú eisini úr føroyskum gróti

**Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið**

Til útisetar í Danmark
**Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað**



**Danstein**
**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**

**Skjót levering**

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

**RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN** **www.danstein.fo**

Sosialurin - 311820

pætur & pætur 320870




Statoilstøðin í Gundadali selur brennievni, men er harafturat ein livandi tænastudepil við øllum til bilin,húsarhaldsvørum, videohandli, grillvørum, kiosk-vørum, vm. Á Statoilstøðini í Gundadali starvast uml. 16 fólk.

# Leiðari
## til Statoilstøðina í Gundadali

Statoilstøðin í Gundadali skal hava nýggjan leiðara .

Tú fært ábyrgd av dagligu leiðsluni av støðini. Tú skalt hava hegni og hug til at fáast við viðskiftafólk, hava leiðsluevni, smidleika og kunna leggja arbeiði tilrættis.

Vit kundu hugsað okkum, at tú ert um 24 - 35 ára aldur, framtakshugað/ur, ágrytin og nýhugsandi.

Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv, sum umframt nógvar avbjóðingar, gevur tær møguleikar fyri persónligari menning, har tú gerst partur av mennandi handilsumhvørvi.

Tú fært møguleikar fyri at dagføra tínar royndir á støðum uttanfyri Føroyar, eins og tú kanst luttakað á skeiðum í Føroyum og uttandands.

Royndir geva fyrimun.

Løn við eftirløn eftur nærri avtalu.

Meira fæst at vita við at venda sær til Statoil á tel 34 35 00 og tosa við Hans Waag.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi innan 8. oktober, og sendast til:

P/F Statoil Føroyar
Postboks 3098
Viðarnes
FO-110 Tórshavn
Merk: Starvslýsing

*Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.*

STATOIL